## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 15 stig. Seint um kvøldið regn.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Seinnapartin støkkur hann vesturum til hvassan vind av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt, men sunnudagin upp í strúk av útsynningi og ælingur. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Hátíðarhildu 25 ára dagin

**Fríggjadagin var opið hús í Hoyvíkar skúla**

RUNDUR DAGUR
*Eirikur Lindenskov*

Fríggjadagin var hátíðardámur í skúlanum í Hoyvík. Tí hendan dagin hátíðarhildu næmingar, lærarar o. o, at skúlin fylti 25 ár.

Fyrrapartin var serstakur skúladagur saman við næmingunum við ymsum tiltøkum, og seinnapartin var skúlin opin fyri vitjandi, sum vildu nýta høvi at heilsa skúlanum á hesum runda degi.

Tað var samanleggingin við Tórshavnar kommunu og nógva sethúsabyggingin í Hoyvíkshaganum, sum elvdi til, at skúlabarnatalið í Hoyvík vaks nógv skjótari enn væntað.



*Næmingar, lærarar og vitjandi hátíðarhildu fríggjadagin, at 25 ár eru liðin, síðani nýggi skúlin í Hoyvík varð tikin í nýtslu*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Petur P. Dahl hevur verið lærari við Hoyvíkar skúla síðani 1974, fyrsti lærari síðani 1978 og skúlastjóri síðani 1994*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tá skúlin byrjaði vóru 77 næmingar í skúlanum og lærararnir vóru seks í tali. Skúlin var bara ætlaður til sjey flokkar. Men sum barnatalið í Hoyvík vaks, er næmingatalið á skúlanum eisini fleirfaldað.

Fyri 10 árum síðani varð skúlin útbygdur til tað dupulta, men barnatalið bara vaks ár um ár.

Við skúlaársbyrjan í ár eru tríggjar skúlastovur komnar afturat – og so sjálvandi eisini ítróttarhøllin – Hoyvíkshøllin.

17 vanligar skúlastovur eru í skúlanum til teir 19 flokkarnar. Næmingarnir eru 439, og lærararnir eru 30 í tali.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | 7 |
| Halifax | 12 |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 20 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 21 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 22 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 20 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 21 |
| New York | 21 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 30 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 990 hPa á 53N-26V fer í útnyrðing norðan og kuldabrúgvin haðani kemur hendavegin.




Lágtrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað og kuldabrúgvin haðani til Írlands verður við Føroyar hósnáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/09 kl. 06⁰⁰– 01/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 30/09 kl. 06⁰⁰– 01/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 90,2 mm


HESTPRENT
Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397


## VESTFALLSKYRRINDI

23. sept.: Mánin longst frá jørðini
29. sept.: Seinna kvarter
6. okt.: Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. okt. | 03.47 | 16.13 | 02.47 | 15.13 | 03.02 | 15.28 | 05.47 | 18.13 | 06.47 | 19.13 | 02.02 | 14.28 | 01.02 | 13.28 | 04.02 | 16.28 | 05.02 | 17.28 | 03.32 | 15.58 | 04.47 | 17.13 |
| 3. okt. | 04.37 | 17.02 | 03.37 | 16.02 | 03.52 | 16.17 | 06.37 | 19.02 | 07.37 | 20.02 | 02.52 | 15.17 | 01.52 | 14.17 | 04.52 | 17.17 | 05.52 | 18.17 | 04.22 | 16.47 | 05.37 | 18.02 |
| 4. okt. | 05.26 | 17.51 | 04.26 | 16.51 | 04.41 | 17.06 | 07.26 | 19.51 | 08.26 | 20.51 | 03.41 | 16.06 | 02.41 | 15.06 | 05.41 | 18.06 | 06.41 | 19.06 | 05.11 | 17.36 | 06.26 | 18.51 |
| 5. okt. | 06.14 | 18.38 | 05.14 | 17.38 | 05.29 | 17.53 | 08.14 | 20.38 | 09.14 | 21.38 | 04.29 | 16.53 | 03.29 | 15.53 | 06.29 | 18.53 | 07.29 | 19.53 | 05.59 | 18.23 | 07.14 | 19.38 |